

*Atli Joensen, sum fekk flestar fiskar í tali*



# Stórur áhugi fyri at fiska við tráðu

**FISKIKAPPING** Leygardagin skipaði nýstovnaða borðtennisfelagið Nykur á Toftum fyri eini serstakari fiskikapping, har luttakarar fiskaðu við tráðu av Nesi og inn á Skipanes. Hóast dagurin gjørdist eitt sindur illfýsin við høgættarvindi, sum er keðilig ætt á Skálafjørðinum, luttóku 70 fólk í fiskikappingini

Vilmund Jacobsen

Tað er deiligt at vera á floti ein góðan dag, og er fiskur at fáa, er tað ikki minst spennandi, tí tú veitst jú ongantíð, hvat er undir bátinum, og hvat kann taka á húkin ella beituna.

Men tað er ikki neyðugt at hava bát fyri at fáa fisk til húsbrúks. Eigur tú tráðu og dugir at finna tær plássini fram við sjóvarmálanum, ber saktans til at fáa nóg mikið av fiski, um tú ert nærlagdur.

Gamalt var at fiska við vanligari bambustráðu við pilki ella húki og agni.

Ein annar og spennandi møguleiki eru sleingitráðurnar, sum kunnu sleingja rættiliga langt, nú góðar, klænar og sterkar dergur fáast til keyps. Við passaligum blýggi á endanum, ber til at sleingja út um taran, har tú umframt reyðfisk, eisini kanst fáa bronding, tosk, longu og annan góðan matfisk.

Um tú slítir av og á, ger minni, tí oftast slitnar niðri við knútarnar, har húkur ella lodd eru knýtt.

Slitnar, bindur tú bara í ein nýggjum – og tað tekur onga tíð hjá tí roynda.

## Stór luttøka

Leygardagin skipaði nýstovnaða borðtennisfelagið á Toftum fyri fiskikapping, har fiskast skuldi við tráðu heilt av Neshamri á Nesi og inn til bátahylin Undir Gøtueiði, innanfyri Skipanes.

Kappingin byrjaði klokkan 14 og endaði klokkan 20. Tilmelding fór fram við egningarskúrarnar á Toftum, har øll, sum vóru við, fóru avstað í senn. Høvi var tó eisini at koma seinni enn klokkan 14 og fara avstað, tí fólk hjá borðtennisfelagnum vóru við skúrarnar allan dagin.

Stigtakararnir til kappingina gjørdust rættiliga ovfarnir, tá tað vísti seg, at ikki færri enn sjeyti fólk teknaðu seg, tó at veðrið var heldur illfýsið við høgættarvindi og ælaveðri, sum lá úteftir Skálafjørðinum.

Luttøkugjaldið fyri hvørja tráðu var 100 krónur.

Tað merktist týðiliga, tá fólk vóru savnaði við skúrarnar, og kappingin skuldi byrja, at spenningurin var stórur.

Nógv elska at fiska, men tey fægstu – fyri ikki at siga eingin - høvdu luttikið í eini slíkari kapping áður.

Hugskotið hjá borðtennisfelagnum á Toftum tóktist soleiðis rættiliga genialt, bæði sum einstaklingatiltak og familjutiltak.

Sum dagurin leið, koyrdu fólk hjá felagnum út á ymisku støðini, har fólk stóðu og fiskaðu, við ókeypis kaffi og sunkist, og har lætt var atkomiligt hjá teimum, sum stóðu fyri hesi tænastu, fingu fólk kaffi og sunkist upp til fleiri ferðir gjøgnum dagin og kvøldið.

Av tí, at fólk koyrdu millum tey luttakandi, frættist eisini, hvussu gekst við veiðini ymsastaðni.

## Fimm vinningar

Tá klokkan nærkaðist 20, byrjaðu luttakarar at rigga av og leitaðu sær heimaftur til skúrarnar við fonginum.

Ikki sørt av forvitni var millum bygdarfólkið og saman við øllum teimum, sum høvdu luttikið í kappingini, var rættiliga fitt av fólki savnað við skúrarnar, tá vinnararnir skuldi finnast.

Tilsamans vóru fimm virðislønir at vinna. Tey trý, sum høvdu største, næststørsta og triðstørsta tal av fiski, fingu hvør sín vinning, og síðan var ein vinningur til størsta fiskin – og ein til tyngsta fiskin.

Kappingin var skipað soleiðis, at ávís mát vóru fyri ávís fiskasløg.

Tá talt varð upp, hevði Atli Joensen 46 fiskar, Eyðun Kjeld 39 og Trygvi Hansen 29.

Størsta fiskin, sum var 78 cm., hevði tann, sum skrivar hesa greinina – og hesin fiskurin var samstundis hin tyngsti og gav soleiðis tveir vinningar.

Tað vísti seg, at tað riggaði væl hjá teimum, sum løgdu seg eftir at fiska seið, tí væl var at fáa, og her hildnaðust tølini betri enn hjá teimum, sum løgdu seg eftir reyðfiski og øðrum fiskasløgum.

Góðir vinningar vóru latnir teimum, sum royndust stinnastir í kappingini, eitt nú sleingitráða við spæli og øllum tilhoyri, jakkar og gávukort.

Tey, sum standa aftanfyri borðtennisfelagið Nykur á Toftum, eru sera væl nøgd við undirtøkuna og fegnast um, at tiltakið eydnaðist so væl.

Eftir at kappingin var lokin, vórðu virðislønir handaðar uttanfyri Kafé Hópin á Toftum, sum eisini hevði góð matartilboð til tey, sum høvdu luttikið í fiskikappingini.

- Hetta var ein sera væleydnaður dagur, og eitt væleydnað kvøld í Kafé Hópinum, sigur Kristian í Stórustovu, formaður í borðtennisfelagnum Nyki.

vilmund@sosialurin.fo